# Grønlendingar søgdu ja til sjálvstýri

**Tríggir fjórðingar av teimum, sum vóru á fólkaatkvøðuni í gjár, atkvøddu fyri grønlendskum sjálvstýri**

Grønlendsku veljararnir vóru ikki í iva, tá teir í gjár tóku støðu til uppskotið um grønlendskt sjálvstýri. Úrslitið gjørdist eitt sannførandi ja, sum meiningakanningar undan fólkaatkvøðuni eisini bendu á.

Av teimum 39.285, sum høvdu atkvøðurætt, vóru 28.268 ella 71,96 prosent í valhølinum og søgdu sína hugsan. Uppteljingin ígjøgnum kvøldið vísti, at stórur meiriluti var fyri sjálvstýrinum kring alt landið. Tá so tað endaliga úrslitið kom frá teimum 79 valstøðunum, vísti tað, at 75,54 prosent høvdu atkvøtt ja, og at 23,57 prosent høvdu atkvøtt nei.

Tey fyrstu úrslitini bendu á, at meiri enn 80 prosent høvdu atkvøtt fyri sjálvstýri, men tað vísti seg, at undirtøkan var lutfalsliga minni í teimum stóru býunum í Vesturgrønlandi. Eitt nú atkvøddu 62 prosent í Nuuk ja, so tá avtornaði, høvdu smá 76 prosent sett krossin við ja.

### Málsøki til Grønlands

Úrslitið av fólkaatkvøðuni ruddar slóð fyri, at umsitingin av fleiri málsøkjum kann latast grønlendingum.

Samstundis fær grønlendska fólkið ognarrættin til tilfeingið í undirgrundini. Her er tó tann semja gjørd við danir, at tær fyrstu inntøkurnar av møguligum tilfeingi í undirgrundini skulu býtast millum Grønland og Danmark við helvtarbýti, til tann danski parturin svarar til tann árliga danska blokkstuðulin til Grønlands. Síðani skulu partarnir viðgera málið av nýggjum.

Málsøki, sum verða verandi undir danskari umsiting, eru eitt nú uttanríkispolitikkurin, gjaldoyra- og pengapolitikkurin, verjupolitikkurin og trygdarpolitikkurin.

Eftir semjuuni millum danir og grønlendingar skal sjálvstýrislógin koma í gildi næsta summar.

## Landsstýrisformaðurin feldi tár av gleði

**Hans Enoksen, landsstýrisformaður, var sjónliga fegin um úrslitið av fólkaatkvøðuni**

- Eg eri sera rørdur av hesum og havi felt gleðitár. Eg takki fólkinum stórliga fyri tess stuðul. Nú kunnu vit taka næsta stigið, segði ein sera væl nøgdur landsstýrisformaður við grønlendska kringvarpið, tá tað endaliga úrslitið av fólkaatkvøðuni var greitt.

Eisini í Inuit Ataqatigiit vóru tey fegin um ta stóru undirtøkuna fyri sjálvstýrinum, og flokkurin er longu klárur við einum yvirliti yvir, hvussu nú skal farast fram.

- Tann fyrsta uppgávan nú er at fara til ST við einari fráboðan um viðurkenning av tí grønlendska fólkinum. Danmark gjørdi eitt mistak í 1954, tá vit mistu okkara rætt, og tað mistakið skal rættast nú, segði formaðurin í IA, Kuupik Kleist, við KNR í nátt.



*Hans Enoksen, landsstýrismaður feldi tár av berari gleði*
*Mynd: KNR*

## Ein stórur dagur

**Lars-Emil Johansen sigur, at hóast ta greiða úrslitið av fólkaatkvøðuni fer Grønland at varðveita tað tætta sambandið við Danmark**

Lars Emil Johansen var saman við eitt nú Jonathan Motzfeldt og Moses Olsen við til at tilevna ta grønlendsku heimastýrisskipanina í sjeytiárunum, og hann fegnaðist í nátt um, at grønlendingar nú hava tikið tað næsta stigið ímóti grønlendskum fullveldi.

- Úrslitið gjørdist betur, enn eg hevði hugflog til at ímynda mær, segði Lars Emil Johansen, sum er formaður í flokkinum Siumut, við Ritzau-tíðindastovuna. Hann legði dent á, at hóast grønlendingar nú hava tikið næsta stigið ímóti fullkomnum sjálvræði, hevur landið framvegis líka gott samband við Danmark.

Lars Emil Johansen takkaði eisini teimum donsku politikarunum, sum hava verið við í arbeiðinum fyri grønlendskum sjálvstýri.



*- Hetta úrslitið er betur, enn eg hevði hugflog til at ímynda mær, segði Siumutformaðurin Lars Emil Johansen*
*Savnsmynd*

## Demokratarnir virða úrslitið

Demokratarnir mæltu grønlendingum frá at taka undir við sjálvstýrinum, men virða úrslitið

-Vit virða avgerðina hjá fólkinum at siga ja. Nú skulu vit hava val, so frískar kreftir kunnu gera tað ábyrgdarfulla arbeiðið við sjálvstýrinum, segði formaðurin hjá Demokratunum, Jens B. Frederiksen, tá tað var greitt, at nógv teir flestu grønlendingarnir hava annað sjónarmið enn hansara flokkur.

Demokratarnireggjaðu fólki til at atkvøða nei til sjálvstýrið. Jens B. Frederiksen, segði í nátt, at hann og flokkur hansara vóru væl nøgdir við, at næstan 25 prosent høvdu atkvøtt ímóti, tí málið var at fáa millum 20 og 25 prosent nei-atkvøður, segði hann.

Hann lovaði, at Demokratarnir fara at arbeioða jaliga við sjálvstýrinum við virðing fyri avgerð fólksins.

## Ráevnini eiga at koma fyrst

**-Hetta svarið er vegurin hjá okkum frameftir, segði ein fegin Jonathan Motzfeldt um úrslitið**



*- Hesum havi eg bíðað eftir í 30 ár*
*Savnsmynd*

- Eg eri bara so glaður, og eg eri sera væl nøgdur.

Jonathan Motzfeldt var millum tey mongu, sum vóru komin saman í Siumut-hølunum í Nuuk sambandi við fólkaatkvøðuna.

- Hesum havi eg bíðað eftir í 30 ár, og tað frøir meg, at undirtøkan var so góð. Tað vísir, at alt Grønland stendur aftan fyri eitt greitt JA, og hetta JA er vegurin hjá okkum frameftir, segði tann gamli politikarin.

Hann hevði longu gjørt sær sínar hugsanir um, hvat nú eigur at standa á skránni.

- Hevði eg avgerðina, hevði eg mælt til, at vit fyrst draga andan og summa okkum. Men ráevnini eru tað fyrsta málsøkið, sum vit eiga at átaka okkum, tí hesum málsøkinum skulu vit hava fulla ábyrgd av. Tí nú hava vit lógligan rætt til tess. Tí eiga vit at leggja eina skrá fyri, hvussu vit fáa tað besta búskaparliga úrslitið fyri Grønland, segði Jonathan Motzfeldt við fjølmiðlarnar.